*Fyri 100 árum síðani var eingin ivi um, nær aldarskifti var:*

# 361 dagar til aldar- og ártúsundskiftið



*Eitt lítið ár er nú eftir, til vit kunnu hátíðarhalda nýggju øldina*

## Fyrsta árið byrjar við ár 1

*Nógv hava seinastu tíðina sett sær spurningin: Nær er aldarskiftið?*

EIRIKUR LINDENSKOV

Spurningurin er aktuellur, tí vit hava júst skift áratíggju. Á nýggjárinum 1990 og aftur í 1991 tosaðu fólk um, at nú fóru vit inn í nítiárini. Tað sama kjakið hava vit í dag. Bæði á nýggjárinum hesaferð og á komandi nýggjári, 2001, fara fólk at tosa um, at nú fara vit inn í nýggju øldina - og harvið inn í nýtt túsundár. Hetta er kanska ikki so einfalt. Hví byrja nítiárini ikki bara, tá árstalið byrjar við níggju?

Tað sama kundu vit sagt um, at túsundáraskiftið skuldi verið, tá talið byrjar við 2, men soleiðis er tað bara ikki.

Í byrjanini av ári 1 byrjaði fyrsta árið, fyrsta tíggjuárið, fyrsta hundraðárið og fyrsta túsundárið. Tá eitt ár varar eitt ár, eitt tíggjuár tíggju ár og eitt hundraðár 100 ár og eitt túsundár 1.000 ár, so má tað fyrsta árið vara ár 1 at enda, tað fyrsta tíggjuárið til endan av 10. árinum og hundraðárið til endan av ár 100 og at enda túsundárið til endan av ár 1.000.

Tí má ár 2 byrja á 1. januar ár 2, næsta tíggjuárið 1. januar ár 11, tað næsta hundraðárið 1. januar ár 101 og næsta túsundárið 1. januar 1001.

Triðja túsundárið byrjar tí 1. januar ár 2001.

*Teir gomlu vóru ikki í iva um aldarskiftið. Ár 1900 var síðsta árið í 19. øld*

EIRIKUR LINDENSKOV

Hóast kønastu roknilærarar hava sagt okkum, at vit nú eru farin inn í seinasta árið í 20. øld, og harvið eisini seinasta árið í hesum túsundárinum, so hava fólk hildið uppá, at øldin er runnin - og at vit nú eru komin inn í 21. øld.

Men soleiðis var lagið ikki fyri 100 árum síðani, tí tá ivaðust tey ikki.

Føroyingatíðindi skrivar 4. januar í 1900 undir yvirskriftini: »Nýggjár« soleiðis:

Árið 1899 er úti, og vit ganga nú á seinasta ári í árhundraðinum. Kasta vit eyguni aftur á tað runna árið, so hava vit at minnast ikki so lítið av góðum og glaðum løtum, men tær eru so samansjóðaðar við harm og stríð sum alt verðsligt. Sjálvsagt er, at vit, sum í felag hava sligið okkum saman til at fremja okkara tjóðskap, hyggja aftur um bak og granska eftir, um vit hava vunnið nakað fram ella hava farið aftur í tí árinum, sum svann.
– Yrkjarin kvæð á sinni:

*»Aftur er runnið árið eitt,*
*hyggjið nú aftur um bak;*
*flestir siga, at árið var feitt;*
*eg sigi, tað var rak*
*Grindir drupust, ei fiskur treyt*
*Tó sigi eg, at árið var rak,*
*málið ei rósar av*
*Ikki slapp tað undir tak;*
*enn á gaddi tað svav….«*

Soleiðis vilja vit vist nógvir siga um árið 1899. Tað hevur kannske verið eitt rakár, málinum viðvíkjandi, men stundin er til at granska, hví árið var so rak. Teir flestu av okkum munnu neyvan hava væntað nakað fitiár í tann máta, og vit eru tí heldur ikki so narraðir. Leggja vit merki til alt tað, sum fyrifórst í tí gamla árinum, so mugu vit siga, at 1899 ikki hevur verið nakað ringt ár. Vit hava í árinum fingið eina sálmabók frá Føringafelag í Kjøbinhavn; eina søgubók hevur landsmaður okkara dr. Jacobsen veitt okkum, og vit gingu av árinum við vón um um at fáa eina bók afturat. Líkaleiðis gingu vit út av árinum við góðum vónum um eitt nýtt almannagagnligt máls frama, eg meini háskúlamálið. Okkara góðu landsmenn Símun Skarð og Rasmus Rasmussen hava jú byrjað háskúla norður í Vági, og tað er gleðiligt at frætta, at hetta málið hevur vunnið størri týdning hjá okkara landsmonnum, enn tað kundi væntast eini slíkari fyritøku av nýggjum. Tí kunnu vit siga: nógv er eftir at ynskja enn , men væl er vunnið. Tað er ikki meiri enn bíligt at takka teimum monnum, sum so treystliga hava tikið fatur í eitt mál og plantað tað í Førjum. Vit mugu tí eisini gera alt, hvat vit eru mentir, til at styðja teir og ynskja alt gott omana yvir teir og sakina….«

### Nýggja øldin byrjað 1901

Í aldarinnar fyrstu útgávu av Føringatíðindum, 31. januar 1901 kunngerð blaðið, at nýggj øld er byrjað. Undir yvirskrivtini »Nýggjár« skrivar blaðið:

–· Tað gamla árið og tað gamla árhundraði fór til gravar, og eitt nýtt ár er runnið upp og eitt nýtt árhundrað við tí. Ein, sum ansar nakað eftur lívinum, soleiðis sum tað verður ført manna millum, við leggja til merkis, at maður av manni leggur sær eina við, at tríva eftir hvørjari rímuligari og órímuligari grund til at stutleika sær. Ein hevur eisini lagt merki til, at árhundraðskiftið av fjøldini skal brúkast sum eitt makaleyst páskot til at sýna kátheit og lættsinni. Um nú eg ella tú vildi funnið, at árhundraðskiftið, var eitt makaleyst tíðsrum til at at lata kátheit og lættsint fjas kvílt eitt bil, og í staðin fyri brúkt stundina til álvara tankar, so verður tú bara vissur í at bæði tú og eg vildi verið hildnir fyri spát. — Vóru Føringar fyrr bundnir í pátrúgv og sjálvgóðheit, so eru teir nú mest byrjaðir við at fjálga um tað lættsinni og følisleysheit, helst andliga lívinum viðvíkjandi, sum er »moderne« aðrastaðnis í verðini. Slíkt vindur alt meiri og meiri uppá seg. Tað, sum nøkur ár síðani var so ilt, at tað mátti goymast í krókinum, tað verður nú opinbarliga framborið og sett í hásætið av tankaleysum »framburðsmonnum« sum einans hava fyri eyga at framseta »djarvar« meiningar og tankar (óføra ofta tonktar og meintar fyrr) »fyri at gera seg til« av teimum. —

»Føringat.«, hevur til mál at fremja og styðja tað gamla, og eisini at fáa Føringar til at gange fram í øllum lutum. Vit hava tí ikki til meining, at stongja folk úti fra tí, sum fyriferst í verðini ella at krógva teir fríðu, nýggju tankar, sum setast fram. Tó vil okkara blað sum eitt hvørt menniskja við røttum sinni velja og vraka eftir besta tykki ímillum tað góða og tað skaðiliga »nýggja«, og ikki svølgja alt nýtt, bara fyri skinnið skyld.



FØRINGATÍÐINDI

Nr. 1. | 31. JANUAR 1901. | 12. ÁR.

**Føringafelag**

hevði aðalfund trettandidag, sum vant er. Á hesum fundi møtti ov fáir limir til at hann kundi roknast fullmentur. Varð tó avgjørt, at felagsblaði »Føringatíðindi«, meðan blaðstýrarin R. Effersø er sjúkur, skuldi gevast út eina ferð um mánaðin og blaðið einans gjeldist við 1 kr., fyri hetta árið. — Nevndin vónur, at góður menn, sum hegartil hava styðjað okkara elsta blað, at teir eisini hereftir mugu gera tað.

**Nyggjár.**

Tað gamla árið og tað gamla árhundraði fór til gravar. og eitt nýtt ár er runnið upp og eitt nýtt árhundrað við tí. Ein, sum ansar nakað eftur lívinum, soleiðis sum tað verður ført manna millum, vil leggja til merkis, at maður av manni leggur sær eina við, at tríva eftir hvørjari rímuligari og órímuligari grund til at stutleika sær. Ein hevur eisini lagt merki til, at árhundraðskiftið av fjøldini skal brúkast sum eitt makaleyst páskot til at sýna kátheit og lættsinni. Um nú eg ella tú vildi funnið, at árhundraðskiftið, var eitt makaleyst tíðsrum til at lata kátheit og lættsint fjas kvílt eitt bil, og í staðin fyri brúkt stundina til álvara tankar, so verð tú bara vissur í at bæði tú og eg vildi verið hildnir fyri spát. — Vóru Føringar fyrr bundnir í pátrúgv og sjálvgóðheit, so eru teir

setast fram. Tó vil okkara blað sum eitt hvørt menniskja við røttum sinni velja og vraka eftir besta tykki imillum tað góða og tað skaðiliga »nyggja«, og ikki svølgja alt nýtt, bara fyri skinnið skyld.

**Tað árið, sum fór.**

Árið 1900 var eitt sjúkligt ár. Einans Sørvágssjúkan ger tað merkiligt á tann hátt. Í árinum doyði fleiri merkismenn, sum fyrr eru nevndir í blaðinum.

Fiskiár má árið kallast. Skipsfiskiskapurin var góður, tí prísurin var høgur. Annars var fiskarúgvan ikki so nógv sum teimum góðu árini frammanundan.

Harímóti kann árið hvørki roknast fyri fugla- ella seyðaár, men grindaár kann tað kallast. Grind doyði í Vágum, í Vestmanna og »norður í sundi«. — Stórhvalaveiðan var góð. Nærum 200 stórhvalir eru førdir í land í Førjum í árinum.

Óhapp hendi í hesum árinum sum í fleiri fyrr bæði á sjógv og landi. Batar fórist og menn fullu.

»Føringat.« skal eisini nevna ta framgongd, okkara strevi viðvíkjandi, sum vert er at merkja. Jógvan Poulsens bíbilsøga er prentað og útgivin í árinum, og hopast má, at hon verður okkara fólki til frama.

Vit mugu siga, at tey árini, sum

*Eingin ivi var um, nær aldarskiftið var, tá farið varð úr 19. í 20. øld*

## 200 stórhvalir førdir til landið í 1900

Árið 1900 var eitt sjúkligt ár, skriva Føringatíðindi í 1901.

Einans Sørvágssjúkan ger tað merkiligt á tann hátt. Í árinum doyði fleiri merkismenn, sum fyrr eru nevndir í blaðnum.

Fiskiár má árið kallast. Skipsfiskiskapurin var góður, tí prísurin var høgur. Annars var fiskarúgvan ikki so nógv sum teimum góðu árini frammanundan.

Harafturímóti kann árið hvørki roknast fyri fuglaella seyðaár, men grindaár kann tað kallast. Grind doyði í Vágum, í Vestmanna og »norður í sundi«

— Stórhvalaveiðan var góð. Nærum 200 stórhvalir eru førdir í land í Førjum í árinum.

Óhapp hendi í hesum árinum sum fleiri fyrr bæði á sjógv og landi. Batar fórist og menn fullu, skrivar Føringatíðindi um árið 1900.

## Dimmalætting fekk kapping

Føringatíðindi 31. januar 1900 skriva eisini um framgongd, sum hevur verið at merkt í farna árið.

» – Jógvan Poulsens bíblisøga er prentað og útgivin í árinum, og hopast má, at hon verður okkara fólki til frama.

Vit mugu siga, at tey árini, sum runnin eru síðani hetta blaðið kom út fyrsti ferð, hava borið framburð til landið. Frammanundan átti Førjar eitt blað, »Dimmalætting«, og hetta blaðið var gamalt av árum, men gekk aleina; eingin trongd var til meiri á tann hátt, fyrr enn »Føringatíðindi« kom út millum manna. Tá kom tann vælsignaði hugurin til at skriva og lesa, og nú hendan greinin verður skrivað, nú eiga Førjar 4 bløð umframt »Dimmalætting« og »Føringatíðindi« og tvær prentusmiðar. At »Føringatíðindi« eigur ærina fyri hendan stóra framburð er eyðvitið og erkennt av øllum«, skrivar blaðið á forsíðuni um „árið, sum fór" 31. januar 1900.

Blaðstýrari á Føringatíðindum um hetta mundið er R. Effersø. Men hann er eftir øllum at døma sjúkur, tí nevnt verður í blaðnum, at blaðnevndin greiður blaðið,

## Transvaalbardagin stóran áhuga

Umframt alt tað føroyska tilfarið, so viðgera Føringatíðindi eisini uttanlandstilfar. Tað, sum um hetta mundið hevur serligan áhuga er Boarakríggið í Suðurafrika.

4. januar í 1899 skrivar blaðið:

»Sum áður er greitt frá herjaði 28. nov. ein eingilskur herførari — Methuen er hann nevndur —, við sínum liði á Boarnar, sum royndu at forða honum at sleppa norð um ánna, ið nevnist Modder River. Bardagin vardi allan dagin við miklum mannafalli. Eingilsk bløð siga, at Boarnir har høvdu 11.000 menn — týsk bløð siga, at teir vóru ikki meir enn 3.000, og at Eingilskmenn har mistu meir enn 1.000 —. Hendan dagin líka sum dagarnar frammanundan, 25. - 27., sigir Methuen seg hava haft góða framgongd, tó at mannafallið var stórt.«





# Marknaðarleiðarin í SvF fer úr starvi

*Gunnhild á Rógvu Olsen, marknaðarleiðari í SvF, hevur sagt seg úr starvi. Hon vil royna okkurt annað, men verður kortini verandi í starvinum til einaferð í summar*

SVEINUR TRÓNDARSON

Í summar fer marknaðarleiðarin í SvF úr starvi. Gunnhild á Rógvu Olsen, hevur verið marknaðarleiðari í Sjónvarpinum í eina tíð, hevur avgjørt at fara úr starvinum í summar.

– Tað er rætt. Eg vil fegin sleppa at royna okkurt annað, men hvat tað verður havi eg ikki avgjørt enn, men møguliga fari eg at útbúgva meg meira, sigur Gunnhild, sum hevur cand. merc. útbúgvin, og sum serliga hevur arbeitt við sølu og marknaðarføring seinastu tíðina.

*Er orsøkin til at tú fert úr starvinum, at SvF hevur havt trupulleikar at fáa fíggjarliga partin at hanga saman?*

– Tað er ikki beinleiðis orsøkin, men tað er ein partur av orsøkini. Tað er til tíðir sera strævið, at arbeiða á einum virki, ella stovni, sum ikki hongur saman fíggjarliga, tí tað avmarkar møguleikarnar at arbeiða við marknaðarføringini, sigur Gunnhild.

– Tað er nú einaferð so, at tá tú skalt undir eitt marknaðarátak, so kostar tað pening, og tað gloyma fólk mangan, sigur Gunnhild, sum kortini leggur afturat, at tað hevur ikki verið trupulleikin í SvF, men har hevur peningurin ikki verið tøkur.

### Fíggarliga ábyrgd

Seinastu tíðina hevur Gunnhild kortini ikki bara tikið sær av tí marknaðarliga partinum hjá SvF, tí í eina tíð, hevur hon eisini havt ábyrgdina av fíggjarliga partinum, sum fekk so stór skot fyri bógvin seinasta summar, tá tað kom fram, at SvF var í álvarsligum fíggjarligum trupulleikum.

Tá kom fram, at SvF ongantíð hevur havt kreditorstýring, sum í flesstu førum er kravd, fyri at kunna hava eina neyva fíggjarliga stýring

– Vit eru farin undir at gera broytingar, soleiðis at vit betra um fíggjarstýringina, sigur Gunnhild, sum eisini fer at hava ábyrgdina fyri fíggjarliga partinum til hon fer frá í summar.

Bygnaðurin í SvF er soleiðis háttaður, at stjórin hevur alla ábyrgdina av rakstrinum, og higartil hava krøvini til stjóran ikki verið orða soleiðis, at hann skal hava eina fakliga útbúgving og eina fíggjarliga útbúgving, sum í mongum førum er treyting fyri at kunna hava fíggjarligu ábyrgdina av eini so stórari fyritøku, sum SvF í veruleikanum er.

Um hetta verður gongdin frameftir er óvist, men landsstýrismaðurin í mentamálum, Signar á Brúnni hevur sagt, at ein møgulig avleiðing av »fíggjaróskilinum« í SvF verður, at ein fíggjarligur leiðari skal setast.

# 6 í rútara endurskoðast

*Nýggja spælið hjá Sjónvarpinum hevur fingið munandi minni undirtøku enn ætlað var frammanundan, og tí verður skipanin við vinningunum í spælinum endurskoða, sigur Gunnhild á Rógvu Olsen, marknaðarleiðari í SvF. Spælið verður kortini ikki tikið av skránni*

SVEINUR TRÓNDARSON

– Vit umhugsa í løtuni, hvussu vit skulu gera við »6 í rútara«, sigur Gunnhild á Rógvu Olsen, marknaðarleiðari í SvF.

Orsøkin til at SvF er farið at endurskoða nýggjasta spælið er heilt einfalt, at tað gevur ov lítið av sær.

Í fjør summar kom fram, at inntøkurnar hjá stovninum vóru nógv minni enn ætlað var frammanundan, og tí varð eitt nýtt spæl sett á skránna týsdag. Ætlanin var, at hetta skuldi vera eitt lætt og hugnaligt spæl, sum skuldi fáa føroyingar at spæla við og gita um hvør goymdi seg á skíggjanum.

Tað er eftir øllum at døma eydnast SvF at fáa fólka t gita, men tað er ikki eydnast teimum, at fáa fólk at gjalda fyri at spæla við.

– Tað er eingin ivi um at tað er stórur áhugi fyri spælinum, tí tað er stuttuligt at gita við, og tað er eingin treyt, at tú skalt hava ein seðil fyri at kunna gita við, sigur Gunnhild, sum staðfestir, at tað ikki er nóg áhugavert hjá fólki at spæla við.

*Er orsøkin til ov lítla áhugan, at tað er ov lítið at vinna í »6 í rútara«?*

– Tað er møguligt, men ein annar veruleiki er, at tað eru so nógv spøl á marknaðinum, sum vit skulu kappast við, og tíverri hevur tað ikki verið til okkara fyrimun, sigur Gunnhild.

### Gekkur heldur stand

Sum kunnugt hevur SvF eisini Gekkin á skránni, og tí spurdu vit Gunnhild, um lítla undirtøkan eisini smittar yvir á Gekkin.

– Nei, tað ger hon ikki. Gekkurin hevur hildið stand í mun til tað sum vit hava mett hann til. Men tað eru eisini tvey heilt ymisk spøl.. Vinningarnir í Gekkinum eru nógv størri, og har er eisini ein trygd fyri, at hevur tú fult rað, so vinnur tú. Henda trygdin er ikki í »6 í rútara«, og tað er kanska ein av orsøkunum til, at undirtøkan er so nógv minni enn væntað. sigur Gunnhild.

Hon leggur kortini dent á, at tað ikki verður upp á tal í fyrsta umfari, at taka spælið av skránni.

– Nei, tað verður tað ikki, men at tað verður broytt, er ikki óhugsandi, sigur Gunnhild á Rógvu Olsen, marknaðarleiðari at enda

# Føroyskur nethandil áveg

*Í eina tíð hevur tað uttanlands verið møguligt at keypa og gjalda við FR-korti um internetið. Um ikki so langa tíð verður hetta eisini møguligt í Føroyum, og tað er Farodane, sum er undangongufyritøkan á hesum øki*

SVEINUR TRÓNDARSON

Tey, sum brúka internetið vita, at tað í longri tíð hevur verið møguligt at keypa og gjalda vørur um internetið. Higartil hevur hesin møguleikin kortini avmarkað seg til útlendskar fyritøkur, men tað er ikki vist, at tað verður so leingi afturat.

Tí á Farodane í Hoyvík, arbeiða teir av grimd, við at gera til eina skipan, sum fer at gera tað møguligt at keypa og gjalda um internetið við FR-korti.

Læt okkum siga tað beinanvegin at skipanin er ikki klár enn, men tað verður hon eftir øllum at døma um ikki so langa tíð.

Ein slík skipan, fer at lata upp nógvar nýggjar sølumøguleikar hjá føroyskum fyritøkum. Uttanlands er ikki hissini hvat tey finna upp á at selja um slíkar nethandlar, men sjálvsagt eru bøkur og fløgur vørur, sum hava serligan áhuga.

Hetta verður eisini møguligt, tí Farodane ætlar at lata aðrar fyritøkur fáa atgongd til teirra skipan, sigur Rolf H. Olsen, frá Farodane.

Og tað er ikki smávegis framgongd hjá fyritøkum, sum annars »bert« hava brúkt internetið, sum »ordraskipan« skilt á tann hátt, at kundar hava kunnað bílagt vørur um netið, sum síðani eru sendar teimum við eftirkravið.

### Strong trygdarkrøv

Tað verða sett sera strong trygdarkrøv í sambandi við handil um internetið.

Tvær ymiskar trygdarskipanir eru tá tað um FR-korttransaktiónir á netinum umræður.

Onnur teirra er sera tung og stirvin, men hon er tryggari enn hin, sum er nógv einfaldari at brúka.

Kortini skal gerast greitt beinanvegin, at báðar tvær eru tryggar, tí sjálv transaktiónin verður koda, ella krypterað, sum tað eitur á fakmáli, og tað inniber, at eingin fær høvd ella hala á tí sum fer fram.

Rolf H. Olsen, sigur, at SSL-skipanin, sum er tann skipanin, sum teir eru í holt við at fáa sær, samstundis er tann skipanin, sum verður brúkt av meiri enn 90 prosent av teimum nethandlum, sum t.d.eru í Danmark.

– Og tey allarflestu, sum keypa um internetið, vilja brúka SSL skipanina. Hin skipanin, sum eitur SET, er alt ov tung at brúka, og tí gera mong tað, at tey avlýsa keypi tá tey síggja, at tað er SET skipanin, sum verður brúkt, sigur Rolf H. Olsen.

Vit fara at frætta nærri um nær nýggja skipanin hjá Farodane verður tikin í brúk.



*Marknaðarleiðarin í SvF hevur sagt seg úr starvi*
savnsmynd